# Hugskot til at undirvísa við *Mist kall*

Rithøvundur: Nora Dåsnes
Bókadeild Føroya Lærarafelags 2023




Vegna Nám: Asta Wolles, Gunvá Magnussen og Lis G. í Jákupsstovu

©Nám

# Tittul: Mist kall

**Tema**: angist, yvirgangur, Oslo, grafisk skaldsøga, vinalag, nýggj byrjan
**Fak:** Føroyskt, (søga og samtíð, samfelagsfrøði)
**Flokkur:** 8. – 10. flokkur og miðnám




## Hvat?

Rebekka og Fariba eru byrjaðar á miðnámi, men alt er ikki, sum tað hevur verið. Bara ein mánaða frammanundan vórðu Oslo og Utøya rakt av eini yvirgangsatsókn. Hvat skal nú henda? Hvussu skal komast víðari, tá ið stóri ósvaraði spurningurin *hví?* stendur eftir?

Hendingarnar í bókini *Mist kall* fara fram í tíðini eftir yvirgangsatsóknina í Noregi. Vit fylgja serliga Rebekku í royndini at venda aftur til gerandislívið. Hóast hon sjálv ikki var beinleiðis rakt av teimum ræðuligu upplivingunum, fær hon tær ikki út úr høvdinum og hevur ilt við at hugsa um annað.

Myndirnar í bókini eru kanska ikki so ágangandi, men tað er tilvitað og hevur sína grund. Vit varnast skilliga, hvussu eitt ótal av tunglyntum hugsanum og iva bylgist inni í Rebekku. Hetta er ein av mongu dygdunum í bókini.

Bókin vann barna- og ungdómsbókmentavirðisløn Norðurlandaráðsins í 2022.

Asta Wolles hevur týtt og tillagað tilfarið úr donskum. Jan Frydensbjerg hevur gjørt danska tilfarið. Uppgávurnar eru ætlaðar eldru næmingunum í hádeild og á miðnámi og arbeiðið tekur umleið 15 undirvísingartímar.

## Hví?

Grafiska skaldsøgan er ein søga um at venda aftur til "tað vanliga" aftan á eina ræðuliga og kollveltandi hending – og tað er eisini við tí í huga, at arbeitt eigur at vera við bókini.

## Hvussu?

Námsfrøðiliga arbeiðsgongdin hevur boð upp á uppgávur bæði áðrenn, meðan og eftir at lisið verður. Dentur er lagdur á, at næmingarnir eru virknir bæði í samrøðuni og í kreativum bókmentauppgávum. Eisini er týdningarmikið at viðgera og arbeiða við grafiska partinum av frásøgnini. Í vegleiðingini eru fleiri hugskot um, hvussu tað kann gerast.

Góðan arbeiðshug 😊

©Nám

# Áðrenn lisið verður

## Ótti

Áðrenn næmingarnir fara at lesa, skulu tey hugsa um, hvussu tey hava tað við ótta. Hvørjum eru tey bangin fyri? Hvat kann fylla teirra hugsanir, so tey hava ilt við at koma víðari? Hvør næmingur skrivar eitt brot, har hann/hon lýsir sínar hugsanir og sína støðu til tað at óttast.

Heingið tekstirnar upp í flokshølinum, so til ber at lesa teir, og so at tit hava teir í huga og taka atlit at, hvat hvør óttast ella stúrir fyri, tá ið tit fara at lesa bókina.

Eitt hugskot er at gera gular lepar við stikkorðum um, hvat tey óttast. Hetta er minni persónligt, og kann vera lættari hjá næmingunum at gera. Næmingarnir kunnu antin arbeiða ein og ein ella í smærri bólkum.

## Utøya

Hvat vita næmingarnir um yvirgangsálopið í Noregi 22. juli 2011? Tosið saman í flokkinum um, hvat hendi, og hvat tey hava hoyrt um hesa ræðuligu hending. Summi vita møguliga lítið, meðan onnur vita nógv um álopið.

Gott er at hava í huga, hvussu nógv yvirgangsálopið skal fylla, tá ið tit arbeiða við bókini – og er tað neyðugt? Skal eins nógvur dentur vera á tekst og myndir?

## Út úr bløðruni, inn í bløðruna

Brúka opnuna, sum liggur saman við hesum skjalinum á snar.fo. Á opnuni, sum er úr *Mist kall,* er teksturin tikin úr talubløðrunum. Uppgávan til næmingarnar er at ímynda sær, hvat kundi staðið í tekstpartinum. Uttan at kenna søgugongdina skulu tey finna uppá og skriva ein tekst, sum tey halda hóskar til myndirnar. Við hesum er fokus á myndaliga uppmerksemið hjá næmingunum. Tey mugu eygleiða myndirnar gjølla og taka støðu til grafiska tónan, huglagið og innihaldið.






©Nám

# Meðan lisið verður

## Elt Rebekku

Hvør næmingur ger eina persónslýsing av Rebekku, sum er høvuðspersónur. Lat næmingarnar skriva niður, meðan tey lesa, um útsjónd, sálarlig og sosial eyðkenni. Harumframt skulu tey velja 10 myndir, sum tey halda stuðla upp undir teirra fatan av Rebekku.

## Reytt samanborið við blátt

Ljósablátt er liturin, sum gongur aftur í myndunum. Stundum verður liturin skiftur út við reytt. Lat næmingarnar kanna hesi skiftini nærri. Hví og nær henda tey? Hvør man orsøkin vera? Og hvat kann ávikavist blái og reyði liturin umboða?

## Greiningarfrymlar

Hvør næmingur velur ein av hesum frymlunum at arbeiða við søgugongdini og bygnaðinum:

Frásagnarfrymil

Aktantfrymil

Frymlarnir liggja saman við hesum skjalinum á snar.fo.

## Eykapersónar

Vit møta fleiri týdningarmiklum eykapersónum í skaldsøguni, sum hvør sær hava eina týðandi søgu. Hvør næmingur velur ein av hesum persónum og greiðir frá, hvat hesin stríðist við, og hvat hesin hevur at týða fyri Rebekku. Tey kunnu velja ímillum Faribu, Joakim, Daniel og mammu Rebekku.

## Endursig við myndum

Meðan næmingarnir lesa bókina, skulu tey velja 10 myndir, sum tey meta eru týðandi fyri at skilja bókina – og fyri søgugongdina sum heild.

## Framsýning

Hvønn týdning hevur og fær framsýningin fyri Rebekku – og fyri at hon kann koma víðari í lívinum? Hví er so trupult at finna fram til, hvat skal vera í framsýningini, og er tað eitt gott hugskot at leggja dent á 22. juli til eina framsýning? Hví/hví ikki?

©Nám

# Tá ið bókin er lisin

## Hvar eru tey vaksnu?

Rebekka stendur nógv einsamøll við sínum hugsanum og grundanum. Henni tørvar í stóran mun vaksin at taka sær av henni, bæði í skúlanum og heima. Tosið saman í flokkinum um hesar spurningar:

- Hvussu heldur tú, at skúlin megnar uppgávuna?
- Hvussu við mammu Rebekku?

## ”Vit hava bara hvønn annan, og vit hava bara nú”

Soleiðis endar bókin – og reyði og blái liturin renna saman. Tosið saman í flokkinum um hesar spurningar:

- Hvussu skilja tit endan?
- Hvussu skal hetta brotið úr bókini skiljast?

## Svara Rebekku

Lat næmingarnar lesa taluna umaftur og skriva Rebekku eitt svar. Tey skulu skriva, hvat tey halda um hennara orð og hugsanir. Næmingarnir skulu skriva, um tey skilja hana og kunnu taka okkurt dømi úr sínum egna lívi, um tey kenna seg aftur í orðum hennara.

## Samandráttur

Næmingarnir skulu endursiga *Mist kall* við at nýta ein av hesum háttunum:

– Emoji-samandráttur
– Haiku-samandráttur
– Bókbento

## Bygnaður

Myndprýðingarnar í bókini eru bæði fyltar við myndum, sum fylla eina heila opnu og smáum teknirøðum, sum bara vísa eitt lítið brot. Næmingarnir skulu finna fimm dømi um ymiskar myndprýðingar.

## Ger títt egna *Mist kall*

Hvør næmingur skal ímynda sær, at hann má ringja til ein persón og lesa eitthvørt inn á telefonsvararan hjá viðkomandi. Tey skulu hava hetta í huga:

- Hvønn ringir tú til?
- Hvat sigur tú?
- Tey skulu tosa boðini inn á egna telefon og senda læraranum ljóðfíluna.

©Nám

# Eykatilfar

### 22. juli – Dagen, der ændrede Norge https://nam.mitcfu.dk/TV0000119144




Norsk dramarøð í 6 pørtum. Tey taka ímóti teimum særdu. Tey troysta tey avvarandi. Tey royna at skilja. Fimm ymisk fólk verða blandað uppí fylgjurnar, tá ið Noreg verður rakt av yvirgangsatsókn 22. juli 2011. Anina sigur frá yvirgangsatsóknini sum tíðindafólk. Eivind má loysa truplar umstøður sum løgreglumaður. Anna Catrina tekur ímóti teimum særdu sum anæstesilækni á sjúkrahúsinum. Helga møtir sorgini tætt at sær sum lærari. Mads er ein høgravendur bloggari, sum hevur givið brotsmanninum íblástur. Dramarøðin byggir á fleiri ára kanningar og samrøður við fólk í norsku stjórnini og fólk, sum vóru til arbeiðis á Utøya meðan álopið var framt og í døgunum aftaná. Eingin av leiklutunum byggir kortini á veruligar persónar.

### De overlevende fra Utøya https://nam.mitcfu.dk/TV0000018930




Fríggjadagurin 22. juli 2011 hevur brent seg inn í norska søgu – dagurin, tá ið Oslo og Utøya vórðu rakt av yvirgangsatsøknunum hjá Anders Behring Breivik. Ein atgerð, sum skelkaði allan heimin. Ígjøgnum tey ungu, sum vóru til staðar á summarlegu hjá AUF á Utøya, verður søgan endursøgd.

### Generation Utøya https://nam.mitcfu.dk/TV0000124841




Norsk heimildarsending frá 2021. 69 fólk vórðu dripin av einum víðgongdum høgrasinnaðum manni á oynni Utøya 22. juli 2011. Tíggju ár seinni hava fýra kvinnur, sum allar yvirlivdu ræðuligu atsóknina, valt at halda fram at stríðast ímóti politiskari ekstremismu.

©Nám